## Evnisdagur um rættindi hjá brekaðum

EVNISDAGUR
*Tíðindaskriv*

Týsdagin 5. oktober verður ein evnisdagur um rættindi hjá brekaðum í Norðurlandahúsinum. Á evnisdegnum verður ein røð av fyrilestrum og framløgum um støðuna hjá fólki, ið bera brek, sum samfelagsborgarar.

Tiltakið, sum byrjar klokkan 13.00, er alment, og luttøkan er ókeypis, so vónandi seta nógv fólk sær hendan seinnapartin av, fyri at hoyra um, hvørji rættindi og hvørja støðu, fólk við breki hava í Føroyum í dag.

Bjørt Samuelsen, fjølmiðlakvinna, stýrir degnum og tekur samanum. Møguleiki er hjá áhoyrarunum at seta spurningar.

Tað er stýrisbólkurin fyri Ár teirra brekaðu 2003, sum saman við Almanna- og heilsumálaráðnum skipar fyri tiltakinum.



# Johannustevnan eydnaðist væl

**Um vikuskiftið var Johannustevna í Vági. Sluppin Johanna TG 326 er 120 ár í ár og ymisk tiltøk vóru á skránni**

JOANNA TG 326
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sluppin Johanna TG 326 í Vági er í ár 120 ár. Um vikuskiftið vóru ymisk tiltøk í Vági í hesum sambandi. Johanna stevndi stolt inn eftir fjørðinum og henni fyldu ymsir bátar, eittnú gomlu grindabátarnir. Leygardagin vóru ymsar kappingar. Kapping í at egna var og vinnari gjørdist Alvi Hjelm. Talan var um tætta kapping, men eftir spennandi kapping var kappingin av eftir einum korteri.

Síðani var kappast í at bøta og vinnari gjørdist Magnus Magnussen og eisini her var sera tætt, bert sekund á muni millum teir fremstu. Vinnararnir fingu prýðislutir úr silvuri, sum Torgerð Suðuroy hevði evnað til, og eisini steyp.







Á skránni var eisini togtogan millum lærarar í Vági og manningina á Vágs Skipasmiðju. Ymiskt var, hvat fólk hildu um úrslitið innan kappingina. Men tað vísti seg at gerast hørð kapping, longi gekk smátt aftur og fram og hart leikaði á. Kappingin gjørdist helst harðari enn mong høvdu hugsað. Men eftir tógvið stríð fingu smiðjumenn fyrimun og vunnu. Eisini teir fingu steyp. Síðani var ábit at fáa á gamla Polarfrost.

Á kvøldi var hugni á Garðabrúgv við Stóra Pakkhús við sangi og Óli Holm helt røðu. Síðani var dansur í VB húsinum við Hans Jacob og vinmonnum. Sunnudagin helt Durita Holm fyrilestur Pakkhúsinum um ferðir sínar.

Joanna lá flaggskrýdd við bryggju og tók seg væl út á 120 ára haldinum.

# Heim fyri minnisveik í Suðuroynni

**Ætlanir eru frammi um at byggja heim fyri minnisveik í Suðuroynni**

HEIM
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í augustmánað hevði Vágs Matmøðrafelag fund, har seinasta hond var løgd á ætlanina um at senda bræv út til allar kommunur í Suðuroynni fyri at vita, um áhugi er fyri at byggja eitt heim fyri minnisveik mitt í oynni, tað vil siga í Hovi.

Á fundi 22. september varð brævið endaliga orðað og er tað sent øllum kommunum í Suðuroynni og brævið er soljóðandi:

**Vágs Kommuna, Tvøroyrar Kommuna, Hvalbiar Kommuna, Famjins Kommuna, Hovs Kommuna, Porkeris Kommuna og Sumbiar Kommuna.**

Nevndu kommunur í Suðuroy hava fingið soljóðandi skriv sendandi:

Vágs Matmøðrafelag hevur á fundi 25.august 2004 samtykt at arbeiða fyri at fáa eitt heim fyri minnisveik bygt í Suðuroynni.

Hetta kann eftir okkara tykki bert lata seg gera, um allar kommunurnar í oynni standa saman um hesa verkætlan, tí tær koma sjálvar at fíggja ein part av kostnaðinum.

Vit fara eisini at heita á tykkum, um so verður, at hetta gerst veruleiki, at lata heimið byggja í Hovi.

Bygdarfelagið í Hovi eigur eitt planerað grundøki, sum er 1268 fermetrar til støddar, sum teir siga seg vera sinnaðar at selja fyri ein sámuligan prís.

Vónandi frætta vit aftur sum skjótast, helst áðrenn 3 vikur, so vit fáa at vita, um vit skulu arbeiða víðari við tiltakinum.

*Vágur 21. sept. 2004*

Vinarliga
**Vágs Matmøðrafelag**
**v/ Elin Jacobsen**
**Nes - Vágur**


# HALDIÐ SOSIALIN

**450,-** um ársfjórðingin

- sparið **395,-**

í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______
Bústaður: ______
Postnr.: ______
Bygd/býur: ______
Telefon nr.: ______
Undirskrift: ______

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO